## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Hvassur vindur ella skrið av útsynningi og ælingur. Hitin millum 7 og 10 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Fyrrapartin strúkur í vindi av útsynningi, men seinnapartin hvassur vindur ella skrið av vestri og útnyrðingi. Ælingur, men kanska onkur sólglotti og hitin millum 5 og 8 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Fyrrapartin stívt andøvsgul upp í hvassan vind av norði, men seinnapartin minni vind av vestri. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 5 og 8 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Leygardagin andøvsgul av landsynningi og yvirhøvur turt, men sunnudagin veksur hann vindin upp í hvassan vind og stundum regn. Hitin millum 5 og 9 stig.

# Hugleiðingar yvir Dalsfles

**Sofus D. Poulsen sýnir í hesum døgum fram í Smiðjuni í Lítluvík. Størsti parturin av framsýningini eru oljumálningar av sama motivi – Dalsfles**

FRAMSÝNING
*Heri á Rógvi*

Trettan myndir við heitinum »Hugleiðingar yvir Dalsfles« fylla sín stóra part av heystframsýningini hjá Sofus D. Poulsen í Smiðjuni í Lítluvík í hesum døgum.

Framsýningin telir í alt 26 listarverk, og fevna hesi um bæði oljumálningar og akvarel.

Á einum túri til Suðuroyar festi Sofus seg fyrstu ferð við Dalsfles, og henda sama fles gjørdist seinni til motiv í ikki færri enn 13 av hansara málningum.

– Tað eru ymiskir litir, ymiskir stemningar, ymiskt ljós, men alt sama motiv. Tað er ein roynd hjá mær at ganga egna rásir, sigur Sofus Poulsen.

Sum heild metir Sofus, at málarar í Føroyum gera ov lítið av at ganga nýggjar leiðir við øðrvísi motivum, sum saktans kundu verið tikin beint úr dagligdegnum.

– Tú kanst rættiliga skjótt enda sum ein kliché, sigur Sofus Poulsen.

Heystframsýningin hjá Sofusi er onnur hjá honum í ár. Hann hevur arbeitt við framsýningini teir seinastu fýra mánaðirnar.

Framsýningin er ein søluframsýning, og hon er opin til 7. november.



*Sofus D. Poulsen leggur á heystframsýning sínari serliga stóran dent á Dalsfles sum motiv*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷2 |
| Nuuk | ÷2 |
| Qaqortoq | 0 |
| Ammassalik | 0 |
| Saint John's | 1 |
| Halifax | 1 |
| Reykjavík | 5 |
| Seyðisfjørður | 6 |
| Tórshavn | 10 |
| Lerwick | 10 |
| Aberdeen | 12 |
| London | 12 |
| Tromsø | 3 |
| Bergen | 5 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 1 |
| Keypmannah. | 6 |
| Helsinki | ÷3 |
| Moskva | ÷2 |
| Berlin | 2 |
| Warzawa | 1 |
| Kiev | 0 |
| Bukarest | 3 |
| Paris | 13 |
| Madrid | 15 |
| Róm | 18 |
| Malorca | – |
| Athen | 19 |
| Malta | 19 |
| Tunis | 21 |
| Beijing | 10 |
| New Dehli | 27 |
| Bangkok | 28 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | – |
| New York | 9 |
| Miami | 28 |
| Los Angeles | 17 |
| Meksikobýur | 21 |
| Panama | 28 |
| La Paz | 11 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 16 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 1003 hPa vestan fyri Írland fer í landnyrðing og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum mikunáttina.




Lágtrýstið millum Íslands og Føroya fer spakuliga eystureftir og gevur eitt skifti høgætt og eitt sindur kaldari veður.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 04/11 kl. 06[00]– 05/11 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 9,1°
Minsti hiti máldur í nov.: ÷7,2° Mesti hiti máldur í nov.: 12,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 28,0 mm – mált frá 04/10 kl. 06[00]– 05/11 kl. 06[00]
Avfallið higartil í november: 46,6 mm

GEVIÐ BLÓÐ
BLÓÐBANKIN
Telefon 311397

Spf.
...hvør sigur at vit eru sum onnur?
HESTPRENT
Dvørgastígur 7
100 Tórshavn
tel 31 45 55
fax 31 80 26
hestoy@hestprent.fo

## VESTFALLSKYRRINDI

4. nov.: Tendring/Mánin næstur jørðini
11. nov.: Fyrra kvarter

Kelda. Álmanakkin 2002

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 6. nov | 07.16 | 19.45 | 06.16 | 18.45 | 06.31 | 19.00 | 09.16 | 21.45 | 10.16 | 22.45 | 05.31 | 18.00 | 04.31 | 17.00 | 07.31 | 20.00 | 08.31 | 21.00 | 07.01 | 19.30 | 08.16 | 20.45 |
| 7. nov | 08.14 | 20.43 | 07.14 | 19.43 | 07.29 | 19.58 | 10.14 | 22.43 | 11.14 | 23.43 | 06.29 | 18.58 | 05.29 | 17.58 | 08.29 | 20.58 | 09.29 | 21.58 | 07.59 | 20.28 | 09.14 | 21.43 |
| 8. nov | 09.12 | 21.41 | 08.12 | 20.41 | 08.27 | 20.56 | 11.12 | 23.41 | — | 12.12 | 07.27 | 19.56 | 06.27 | 18.56 | 09.27 | 21.56 | 10.27 | 22.56 | 08.57 | 21.26 | 10.12 | 22.41 |
| 9. nov | 10.09 | 22.37 | 09.09 | 21.37 | 09.24 | 21.52 | — | 12.09 | 00.41 | 13.09 | 08.24 | 20.52 | 07.24 | 19.52 | 10.24 | 22.52 | 11.24 | 23.52 | 09.54 | 22.22 | 11.09 | 23.37 |